## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landsynningi. Skýggjað og at byrja við okkurt kavaælið. Hitin um frostmarkið, men út á dagin nakað lýggjari.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi. Skýggjað og regn í skiftum. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið tollaksmessudag og jólaaftan:**
Hvassur vindur av landsynningi. Skýggjað og regn fyri tað mesta. Hitin økist til millum 4 og 8 stig.

# Jólahald á Barnadeildini

**Fyri stuttum var jólahald á Barnadeildini. Jólamaðurin, Kjøtkrókur, var og vitjaði børnini, og eisini sluppu tey at dansa jólatræ**

JÓLASTÁKAN
*Ingrid Bjarnastein*



*Fyri stuttum var jólahald á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum. Kjøtkrókur var og vitjaði og børnini sluppu eisini at dansa jólatræ*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nógv jólahald er u kring landið í hesum døgum, og eisini gera tey á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum sítt til, at eisini tey sjúku børnini skulu fáa eini góð og hugnalig jól.

Fyri ikki so langari tíð síðani var jólahald á barnadeildini.

– Hetta var ein hugnaløta áðrenn jól fyri børnunum, sum liggja á deildini, systkjum, avvarðandi og starvsfólki, sigur Tove Thomsen, deildarsjúkrasystir.

Musikkskúlin hevði næmingar, sum komu at spæla nøkur jólaløg. Nógvir jólasangir vóru eisini á skránni, og eisini var, sum siður er, dansað um jólatræið.

Jólamaðurin, Kjøtkrókur, sum hevur úr at gera hesa ársins tíð, var eisini á vitjan. Børnini fingu góðgæti og frukt, meðan tey vaksnu fingu kaffi.

Tove sigur, at tað seinastu árini eru ikki nógv børn, sum hava ligið á deildini á jólum.

– Vit royna altíð at senda børnini heim eftir førimuni. Tey, sum búgva nærhendis, sleppa heim, og so koma tey aftur um kvøldið, sigur hon.

Børnini, jólamaðurin og familjurnar fingu henda dagin ein hugnaligan dag saman.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷8 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 3 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 5 |
| Tromsø | ÷11 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | ÷1 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷13 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷10 |
| Bukarest | ÷6 |
| Paris | 2 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 4 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | ÷1 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst yvir Noregshavinum fer eystureftir samstundis sum eitt hátrýst yvir Norðurgrønlandi breiðir seg í ein landsynning og køld luft við ælingi rekur inn yvir Føroyar norðaneftir.



Í vikuskiftinum fer eitt lágtrýst vestan fyri Írland fer í ein landnyrðing. Eitt annað lágtrýst fer samstundis av suðri móti Íslandi. Sum frálíður rekur lýggjari luft við regni inn yvir Føroyar av landsynningi.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/12 kl. 06⁰⁰– 20/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,3°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,8 mm – mált frá 19/12 kl. 06⁰⁰– 20/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 58,3 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

14. des.: Mánin longst frá jørðini
19. des.: Fullmáni
27. des.: Seinna kvarter
30. des.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. des. | 07.37 | 20.02 | 06.37 | 19.02 | 06.52 | 19.17 | 09.37 | 22.02 | 10.37 | 23.02 | 05.52 | 18.17 | 04.52 | 17.17 | 07.52 | 20.17 | 08.52 | 21.17 | 07.22 | 19.47 | 08.37 | 21.02 |
| 22. des. | 08.28 | 20.53 | 07.28 | 19.53 | 07.43 | 20.08 | 10.28 | 22.53 | 11.28 | 23.53 | 06.43 | 19.08 | 05.43 | 18.08 | 08.43 | 21.08 | 09.43 | 22.08 | 08.13 | 20.38 | 09.28 | 21.53 |
| 23. des. | 09.18 | 21.41 | 08.18 | 20.41 | 08.33 | 20.56 | 11.18 | 23.41 | — | 12.18 | 07.33 | 19.56 | 06.33 | 18.56 | 09.33 | 21.56 | 10.33 | 22.56 | 09.03 | 21.26 | 10.18 | 22.41 |
| 24. des. | 10.05 | 22.29 | 09.05 | 21.29 | 09.20 | 21.44 | — | 12.05 | 00.41 | 13.05 | 08.20 | 20.44 | 07.20 | 19.44 | 10.20 | 22.44 | 11.20 | 23.44 | 09.50 | 22.14 | 11.05 | 23.29 |

5 707265 100067 >